# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Ein ribbaldur níti

Í endurminninum sínum skrivar Mandela, at tað burtursæð frá lívinum, eini góðari heilsu og gott samband við Tembu kongshúsið, var tað einasta hann fekk frá faðir sínum navnið Rolihlalha. Rolihlalha merkir á xhosa máli at rysta eina grein á einum træ. Mandela ger vart við, at í talumáli merkir heitið Rolihlalha ein ribbaldur. Hann trýr ikki, at navn er lagna, men samstundis skrivar hann skemtandi, at skyldfólk og vinir halda navnið hava verið orsøkin til tey mongu politisku illveður, ið hann hevur elvt til og ein orsøkin, at hann hevur klárað seg so væl í lívsins stormum. Í dag verður hann so níti, maðurin sum á lívi er vorðin hugtak og ímyndin uppá rættvísisstríðið móti apartheid og órættvísi í heimlandinum Suðurafrika. Hann varð frá morgunstundini fagnaður um allan heim. Føðingardagurin verður hildin í heimbygdini Mvezo, har skúlabørnini leingi spent hava vant føðingardagssangin til æru fyri landsfaðirinum.

Tá Mandela sum ungur fór undir sítt politiska virksemi lovaði hann at gera alt tað, hann var mentur til tess at beina burtur apartheidskipanina, sjálvt um hetta skuldi kosta honum lívið. Í dag kann staðfestast, at Mandela helt orð. Mandela var frá ungum árum væl útgjørdur til at gerast politiskur undangongumaður. Hann fekk góða løgfrøðiliga útbúgving á einum av lærdu háskúlunum, har rasisman enn ikki hevði fingið fastatøkur, har hann nam sær kunnleika til politikk, heimspeki, stjórnmálafrøði og løgfrøði. Hann varðveitti samstundis sambandið við upprunaligu mentanina í heimlandinum, hevði stóran kunnleika til tær ymsu mentaninar í Suðurafrika, til landsins søgu eins væl og veraldarsøgu. Hann var sostatt sera væl útbor in at gerast politiskur leiðari hjá svørtu tjóðini í stríðnum móti apartheid. Apartheid var tann ódámliga kúganarskipan, sum skuldi tryggja hvíta minnilutanum alt politiskt og búskaparligt vald í Suðurafrika.

Hóast Mandela sat í fangahúsi í 27 ár var hann verandi óformligi leiðarin í politiska stríðnum móti aprtheid. Hann hevði í tíðini, til hann í 1964 var settur í varðhald á Robben Island, vunnið sær so stóra virðing fyri sítt politiska arbeiði, sítt dirvi og síni leiðsluevni, at sjálvt 27 ár handan rimar ikki kundu vika stoðu hansara. Á valdegnum tann 27. apríl 1994, tá hann hevði staðfest valsigurin hjá ANC, lovaði hann sær sjálvum, at prædika sátt og semju, at grøða sárini hjá øllum landinum, at skapa álit og tryggleika. Sjálvt um alt ikki gekk, sum ætlað, í tí nýggja Suðurafrika eftir skiftið í 1994, tykist tað, sum hetta mál Mandelas er rokkið, í hvussu so er um samanborið verður við onnur lond, sum kunnu samanberast við Suðurafrika. Mandela kemur at standa sum ein av heimsins mætastu politisku leiðarum, ein sannur demokratur og humanistur, ein fyrimynd hjá øllum teimum, sum ynskja rættvísi og vælferð fyri mannaættina. Vit ynskja honum hjartaliga tilukku!

**Sosialurin**

## Tilmælini um fiskastovnarnir og veiðitrýsti

**JACOB VESTERGAARD**
løgtingsmaður



Ymiskar metingar hava seinastu tíðina verið frammi um okkara fiskatilfeingi, hvussu fiskastovnarnir eru fyri, hvussu teir best kunnu gagnnýtast og hvussu samansetingin av veiðiflotanum eigur at vera.

M.a. hevur nevnd samansett av serkønum handað landsstýrismanninum í tilfeingismálum frágreiðing um fiskiorkuni hjá ymisku skipabólkunum, eins og hann hevur eftirmett fiskidagaskipanina.

**Eksakt vitan ella bert metingar**

Vit hava havt fiskidagaskipanina síðan 1996.

Vit vita við vissu hvussu nógv vit hava veitt av botnfiski undir Føroyum, og vit hava øll tilmælini frá Fiskirannsóknarstovuni langt aftur í tíðina.

Umframt tað, hava vit metingarnar frá útróðrarmonnum, línumonnum, trolmonnum o.ø. úr vinnuni, sum hava lívslangar royndir á sjónum og út frá hesum duga at lesa broytingarnar í havinum og støðuna hjá stovnunum.

Vit skulu eftir Ólavsøku taka støðu til, hvussu karmarnir skulu verða fyri fiskivinnuna næsta fiskiárið. Hetta eiga vit at gera við støði í øllum teimum metingum vit hava til taks, umframt at vit mugu hava í huga tær royndirnar, ið vit hava havt av fiskidagaskipanini síðan 1996.

Partar av lívfrøðini er eksakt vitan, meðan aðrir partar, herundir tilmælini um hvussu útlitini eru fyri fiskastovnarnar, eru metingar, sum er eru gjørdar út frá ymiskum kanningum av viðurskiftunum í havinum eitt ávíst tíðarskeið, umframt skrásetingum og kanningum av tí, sum veitt hevur verið undanfarnu árini.

Hóast tilmælini eru gjørd út frá vísindaligum frimlum og mannagongdum, kann ein ikki siga, at tilmælini eru eksakt vitan, men metingar, sum eru bygdar á m.a. "søguligar" upplýsingar og hagtøl.

**Ósamsvar í tilmælunum**

Hóast Fiskiransóknarstovan mælir til munandi niðurskurð av døgunum, serliga hjá húkaflotanum, sum veiðir nógvan tosk, staðfestir Fiskiorkunevndin, at tað innan húkaflotan ikki er hend nøkur øking í fiskiorkuni.

Serfrøðingarnir á Fiskirannsóknarstovuni eru sostatt ikki samdir við serfrøðingarnar í Fiskiorkunevndini.

Samstundis meta útróðrarmenn og aðrir sjómenn, út frá tí teir síggja av broytingum í sjónum, at útlit eru fyri betri toskafiskiskapi í heyst.

Góðu tíðindini um at nógvur toskayngul sæst í sjónum, samsvara ikki heilt við úttalilsini og ástøðið hjá Fiskiransóknarstovuni um, at toskastovnurin er so lítil, at hann ikki er førur fyri at endurnýggja seg.

Fiskiorkunevndin staðfestir eisini, at ein øking er farin fram í veiðiorkuni í partrolaraflotanum, hóast trolararnir eru færri í tali. Hetta samsvarar illa við útsagnirnar frá Fiskirannsóknarstovuni, tí veiðan eftir upsa, sum partrolarnir eiga sín stóra lut í, hevur sett met og upsastovnurin er væl fyri.

Vónandi kann Fiskiorkunevndin fáa tað neyðuga tilfari frá Fiskirannsóknarstovuni áðrenn ólavsøku, so hon kann endurtaka roknistykkið, sum Skipanarnevndin gjørdi í 1996, og koma við einari endaligari niðurstøðu um fiskidagarnar fyri 2008-2009.

Spennandi verður so at síggja, um niðurstøðan frá Fiskiorkunevndini samsvarar við tilmælið frá Fiskiransóknarstovuni um fiskidagar fyri komandi fiskiár.

Hyggja vit aftur í tíðina, og samanbera tilmælini frá Fiskirannsóknar-stovuni og tað sum veitt er av botnfiski undir Føroyum, síggja vit prógvini um, at tilmælini bert eru metingar, tí tey samsvara í mongum førum als ikki við veruligu støðuna.

Vit mugu sostatt ásanna, at tá tað snýr seg um náttúruna, herundir tað, sum gongur fyri seg í havinum, situr ongin ikki við tí æviga sannleikanum, tí tað er mangt sum hendir í náttúruni, sum ongin hevði varhugan av frammanundan.

**Niðurstøða**

Vit liva av tí sum havið gevur, og enn eru ongar ábendingar um at vit koma at liva av nøkrum øðrum. Tí mugu vit vera sera varin og ikki taka ov ógvuslig stig.

Ongin gagnnýtir hetta tilfeingið á so burðadyggan hátt sum vit, og ongin fær lutfallsliga so nógv burtur úr fiskivinnuni sum vit.

Hetta eiga vit at halda áfram við. Skulu tillagingar gerast í skipani, so skulu tær henda líðandi, soleiðis at vinnan og Føroya land ikki missur fótafesti, og ikki fremjast sum ein kollvelting, tí onkur sær møguleikan fyri hesum nú fiskimenn og reiðarar eru illa sperdir av hækkandi oljuútreiðslum.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Niels Petersen niels@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8-20.00 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**

Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.